Service) gjørdi. Hann varð dømdur at sita í fýra ár, fyrst í vanligum fongsli, men síðani á »korrektións-anstalti«. Moon varð leyslatin aftaná tvey ár. Hóast tey ítøkiligu prógvini um umfatandi skattasvik, vóru ákærurnar frá skattamyndugleikunum og atfinningarnar í fjølmiðlunum skírd av viðhaldsfólkunum at vera »hugmyndafrøðilig forfylging«. Nógv hildu, at hetta fór at verða endabresturin hjá rørsluni, men nakað heilt annað er hent. Nakrar mánaðir eftir leyslatingina byrjaðu prestar, gudfrøðingar og enntá blaðmenn ymsastaðni í USA at skriva greinir, har teir gjørdu vart við, at Moon hevði í royndum verið fyri stórum órætti — skattamyndugleikarnir høvdu borið seg skeivt at og lítið ella einki hald var í ákærunum móti honum. Hvat var hent?

Størsta virksemið hjá Moon-rørsluni ígjøgnum seinastu 20 árini er fyrireiking av altjóðastevnum og fundum, har kendir persónar, vísindamenn, politikarar, blaðstjórar o.a., verða bodnir at luttaka. Allur kostnaður í sambandi við hesar stevnur, ið verða hildnar í heilum um allan Vesturheimin og í Asiu, er goldin av Moon-rørsluni. Tað verður ikki sagt alment, at Moon-rørslan stendur aftanfyri stevnurnar. Teir almennu fyrireikararnir eru stovnar og felagsskapir innan rørsluna, sum CARP (Collegiate Association for the Research of Principles), GCWR (Global Congress of World Religions), ICF (International Cultural Foundation), PWPA (Professors World Peace Academy), ICF (International Conference on Law and Individual Freedom) og nógvir aðrir. Í nógvum førum hava stevnugestirnir ikki hóming av at stevnan verður fíggjað av Moon. Allar hesar stevnur kosta ómetaliga nógvar pengar. Fíggingin av teimum fer soleiðis fram, at viðhaldsfólkini hjá Moon, í næstan øllum førum ungdómar, ganga á gøtunum í amerikanskum stórbýunum og selja blomstur og gingseng-te, sum kemur frá Moons egna te-virki í S-Koreu. Nógv tann størsti parturin av tí dagliga aktivitetinum hjá ungu viðhaldsfólkunum fer í hetta fíggjarvirksemið. Aftanfyri er stór organisatión og fyrireikandi arbeiði. Moon-ungdómarnir minna eina helst um ein væl disiplineraðan her, ið hevur bert eitt endamál: at útvega pening til yvirbygnaðin hjá rørsluni.

Tá ið Moon varð leyslatin, varð hetta velduga fíggjarmaskinarí sett í gongd, og úrslitið var, at Moon kundi innanfyri nakrar mánaðir halda stevnur kring alt USA, har prestar, gudfrøðingar, blaðstjórar og politikarar vóru innbodnir. Hetta intensiva virksemi hevði stóra ávirkan og bleiv eitt vendipunkt hjá rørsluni, við tí úrsliti, at Moon stendur stinnari nú enn nakrantíð fyrr. Mett verður, at bert hetta stevnuhaldið kostaði umleið 15 mió. dollarar. Ungdómarnir, sum selja blomstrini og gingseng-teið, siga seg ongantíð arbeiða fyri Moon, men at tey arbeiða fyri góðgerðarrørslur, sum hava til endamáls at hjálpa narkomanum og foreldraleysum børnum. Nógv bendir á, at ungdómarnir sjálvir trúgva hesum, sum týðir uppá, at hetta eru grundgevingarnar, tey fáa á Moon-legunum, har tey búgva. Fyrrverandi Moon-istar siga, at hetta verður nevnd »himmalsk lygn«, tí hon fremur ta stóru ideologisku ætlanina hjá Moon.

Størstu fíggindar, Moon eigur, eru uttan iva foreldrini hjá teimum ungdómum, sum fjeppast uppi í rørsluni. Søgur um mannrán, heilavasking hava fylgt rørsluni frá tí hon byrjaði í USA og Europa. Ungdómar verða av Moon eggjaðir til at kvetta øll bond við familju og vinir.

Hóast politiska og fíggjarliga virksemið, er Moon-rørslan ein trúarrørsla burturav. Tann stóra ávirkanin, Moon hevur ímillum viðhaldsfólk, byggir á, at hann verður av teimum mettur at vera Messias. Rørslan byggir á kristnum grundarlagi, men viðurkennir eisini aðrar religiónir. Í høvuðsheitum sær gudfrøðin soleiðis út: Tá ið Jesus kom í heimin, var tað ætlanin at hann skuldi gifta seg við eini fullkomnari kvinnu og stovna ta »ideellu familjuna«. Henda ætlanin miseydnaðist fullkomiliga og Jesus varð krossfestur. Nú er Moon komin við somu ætlan og tann »ideella familjan« er longu stovnað. Hon er Moon sjálvur, seinna kona hansara og 13 børn. Tann fyrra konan hjá Moon læt seg skilja frá honum. Moon-viðhaldsfólkini siga, at orsøkin var tann, at hon ikki toldi at liva saman við so andliga upphevjaðum persóni. Tann »ideella familjan« er kjarnan í tí komandi heimsskipanini, har ongin synd er longur til, tí sosialisman, sum er atvoldin til


Antiisman:

Tongil-isman

Eftir meti flestu føroyinga er »Unification Church« hjá tí heimskenda »pastor Moon« ein ranglæra. Hin vegin eigur eingin at siggja burtur frá tí veldiga sosiala arbeiði, henda rørsla hevur gjørt og framvegis ger. Hvørki »Unification Church« ella danska deildin — »Tongil-familien« er ein høgrasinnað rørsla, men atfinningarnar hjá hesi rørslu botna harafturímóti í einum hørðum bardagamóti materialismu, ateismu og øllum ismum, sum ikki seta Várharra í hásæti.

Dagblaðið hevur gjørt nógv burtur úr Tongulrørsluni, sum eisini hevur stóra ávirkan á virksemið hjá loyniligum felagsskapum sum eitt nú »Selskabet til værn for dansk folkestyre«, har eisini Óli Breckmann fólkatingsmaður er limur.

alla synd, er burturbeind av jørðini. Í hesum »idylliska« heimi fer mannaættin at liva sum í einum paradís.

Moon hevur ikki sagt tað alment enn, at hann er Messias, men ímillum viðhaldsfólkini ganga rit, ið verða ognað Moon, og verða lisin sum heilagt orð. Her verða nøkur brot úr hesum ritum endurprentað:

»Gud livir í mær og eg eri hansara inkarnatión. Eg havi allan heimin í hond míni, og eg fari at sigra og boyggja heimin undir meg.«

»Eg eri størri enn allir spámenninir, ja, størri enn Jesus.«

»Eg eri hugsari. Eg eri tykkara heili..... Eg vil hava limir, sum eru mær lýdnir, sjálvt um teir ólýdnast foreldrum sínum og forsetanum. Og um eg fái helvtina av heiminum við mær, so fari eg at renna heimin á hovdið.«

»Tit mugu byrja eitt nýtt lív saman við mær og avnokta tykkara familju, vinir, grannar og skyldfólk. Tit mugu vera rein. Um tit eru órein, er tað betri fyri tykkum at gera enda á tykkum sjálvum enn vera framvegis livandi. Til at endurreisa menniskjuna frá tí illa, mugu vit snýta.«

»Vit mugu fokusera á eina tjóð og soleiðis fáa vald á øllum heiminum. Til hetta endamál valdi eg USA. Sameindu Tjóðir mugu burturbeinast. Tær eru undir kommunistiskum stýri. Vit mugu mynda nýggjar Sameindu Tjóðir... Vit kunnu gera okkara egnu limir til senatorar og limir í Umboðsmannatinginum. Eg havi møtt nógvum sonevndum gitnum senatorum og Umboðstinglimum, men fyri mær eru teir onki. Teir eru veikir og hjálparleysir. Vit fara at vinna bardagan. Hetta er okkara dreymur, okkara uppgáva. Men tit mugu einki siga av hesum.«

Lutaseðlar fyri Sjómansheimið í Reykjavík 1986

Hesir seðlarnir hava vunnið:

1. nr.	1960	6. nr.	11943
2. —	9594	7. —	6158
3. —	12353	8. —	1207
4. —	8090	9. —	6545
5. —	11429		

Nærri upplýsingar á tlf. 47636.

NEVNDIN

Royndarstøðin

ger kunnugt

Í samband við, at ROYNDARSTØÐIN Í KOLLAFIRÐI alment verður tikin í nýtslu verður OPIÐ HÚS fyri áhugaðum fríggjadagin tann 26. september millum kl. 13 og 19.

ROYNDARSTØÐIN
3862 Kollafjørður

Deildarleiðari

Starv sum deildarleiðari á gjaldstovudeildini í Klaksvík er leyst at søkja.

Starvið er tænastumannastarv, og er lønt eftir lønarrammu 19-21.

Við núgaldandi viðbótum er byrjunarlønin 13.354,40 kr. og endalønin 15.225,02 kr. um mánaðin.

Umsóknir til starvið við upplýsing um aldur, starv áður, hjálagt møgulig prógv og viðmæli verða at senda landsstýrinum sum skjótast og í seinasta lagi 10. oktober 1986.

FØROYA LANDSSTÝRI

Hús í Vági

til leigu.

Tlf. 23538

Tilboð

ynskist til stoypan av 1-plans-húsum, innilokan og innrættan. At byrja heilt skjótt.

Tlf. 21561

Lýsið í sosialinum